


Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
-tað
loysir
seg



Laaaannngt vikuskifti í Keypmannahavn

hósdag til mánadag...ja!
1.995,- *)




**Galdandi til 28. oktober**

Undirhald, søga og hugni. Keypmannahavn hevur alt. Unna tær sjálvum eina fríløtu frá gerandisdegnum. Eitt vikuskifti, har tú tekur tær av løttum. Spáka tær ein túr á Stroynum, keyp inn, stuttleika tær í Tivoli, ella fáa tær ein góðan bita í Nýhavnini. Alt ber til í deiligu Keypmannahavn.

Tú fert úr Vágum hóskvøld kl. 20.40. Tú ført sostatt arbeitt allan hósdagin, og tú hevur allan fríggjadagin í Keypmannahavn.

Atlantic Airways hevur nú hesar eykatúrar:

| | | |
|---|---|---|
| Til Keypmannahavnar: | hóskvøld | 20.40 |
| Til Føroya: | fríggjadag | 08.55 |
| Til Keypmannahavnar: | sunnukvøld | 17.30 |
| Til Føroya: | mánadag | 07.45 |

*) Ferðaavgjald sum er kr.365,- kemur afturat prísinum

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 10 · Fax 34 10 01 · booking@atlantic.fo

Bílegg hjá tínari ferðaskrivstovu ella hjá Atlantic Airways

www.atlantic.fo

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3226
Navn: Sp/f KG Trading
Adressa: 700 Klaksvík

Kommuna: Klaksvíkar Kommuna
Stovningardato: 25.07.2001
Viðtøkudato: 25.07.2001
Kapitalur: Kr. 100.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 100.000,00 til kurs 100.
Stovnarar: TS Seafood A/S, Læssevej 14, DK-6700 Esbjerg og Sp/f KG 699 , Stødlagøta 14, 160 Argir (Sp/f 2825)
Stjórn: Gunnar Gunnarsson, Oman Mattalág 12, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður bundið við undirskrift av einum stjóra.
Grannskoðari: : Sp/f HanSam, Tróndargøta 39, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 25.07.2001 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at virksemi innan keyp og sølu, og flutning og annað virksemi sum stendur í samband við hetta.

Skráseting Føroya tann 24. august 2001

Kristin Balle

Sosialurin fer í býin hvørja viku og tú sleppur at fylgja við hvussu hetta spælir av

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara kæri maður, pápi, verfaðir, bróður, versonur og svágur

**KÁRI JOHANNESEN**
Fuglafjørður

flutti heim til Harran mánamorgunin 27.8.
52 ára gamal.

Jarðarferðin verður fríggjadagin 31/8
kl. 14.00 úr Siloa

Familjunnar vegna
**Liljan, Sólvá og Klæmint**
**Viggo og Maria**
**og Bergur**

*i i ila a bl r lla ra s*
*s a i la a ar p a i a*
*p i a v .*
*p i as v*



# Róstur filmur til Klaksvíkar

**Í komandi viku fer Atlantis at sýna filmin Burturhugur, sum snýr seg um fólk og lív í Hattarvík**

FILMUR
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Vældámdi og rósti filmurin hjá Teiti Árnason um bygdina Hattarvík verður nú sýndur í Klaksvík.

Komandi mánakvøld og týskvøld verður filmurin at síggja í mentanarhúsinum Atlantis.

Filmurin, sum kallast Burturhugur, varð frumsýndur Norðurlandahúsinum undir Listastevnuni fyrr í hesum mánaðinum. Síðani hevur filmurin gingið fyri fullum húsum á gamla Meiarínum.

Filmurin hevur fingið góð skoðsmál, og móttøkan var sera góð millum fólk.



*Mánakvøldið og týskvøldið í komandi viku verður filmurin Burturhugur, sum snýr seg um Hattarvík, sýndur í Atlantis í Klaksvík*

### Øðrvísi filmur

Burturhugur er eitt slag av dokumentarfilmi. Filmurin leggur seg eftir at geva eina mynd av tilveruni í bygdini, soleiðis sum hesi 7 fólkini uppliva hana. Men tann, ið væntar sær nágreiniligar frágreiðingar um seyðahald, fisk ella bygdamenning, verður bilsin.

Burturhugur er øðrvísi á tann hátt, at hann fer heilt tætt at fólkunum, letur tey sjálv siga frá um tankar, dreymar, ótta, skemtiligar søgur og um, hvønn týdning lívið í bygdini hevur fyri tey.

Hetta verður gjørt á gerandisligan og livandi hátt, sum samstundis gevur rúm fyri bæði álvara og eisini poesi.

Staðið sjálvt og umhvørvið sleppa at seta sín dám á filmin. Skýggj, sól, traktorar, starar, vindur, kirkjan og havið verða flættað saman við frásagnum hjá teimum 7 fólkunum, tónleiki, sum Kári Sverrisson hevur gjørt, og yrkingum, sum Tóroddur Poulsen hevur skrivað til filmin.

### Ikki regluligt enn

Tað er nú langt síðani, at regluligar filmssýningar vóru í Atlantis. Tá umvælda mentanarhúsið lat upp var biografvirksemi í húsinum, men tað steðgaði, tá virksemi í húsinum var tyngd av stórari skuld fyri umbyggingina.

Nú er fíggjarligi parturin av húsinum fingin upp á pláss, men enn er ikki farið undir biograf aftur, hóast hetta hevur verið eitt av endamálunum við at fáa húsið at virka aftur.

Útgerðin til at sýna filmar er í Atlantis, og tí ber til at seta Burturhugur á plakatuna.

Filmurin verður sýndur í Atlantis mánakvøldið kl. 20 og týskvøldið kl 21. Atgongumerki á 60 krónur fáast í forsølu á Norðoya Kunningarstovu ella í Atlantis ein tíma undan sýning.

# Ungfólk og útlendingar sum flyta



*– Tey, sum eru flutt úr Klaksvík higartil í ár, eru serliga útlendingar og ein stórt tal av ungfólkum, sum fara av landinum at lesa, sigur Steinbjørn Jacobsen um minkingina í fólktatalinum í Klaksvík.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Borgarstjórin í Klaksvík óttast ikki afturgongdina í fólkatalinum higartil í ár. Tað eru serliga útlendingar og ungfólk í lestrarørindum, sum eru flutt úr Klaksvík í ár, heldur hann**

FÓLKATAL
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Meðan stórur av landinum hevur upplivað vøkstur í fólkatalinum, er næststørsti býurin í landinum tódnaður eitt sindur higartil í ár.

Eitt hálvt prosent færri av fólki býr nú í Klaksvík, í tølum er tað ein afturgongd upp á 26 fólk fyrstu sjey mánaðirnar í ár.

Hetta er ikki nakað, sum loypir kvøkk á borgarstjóran í Klaksvík.

– Tey, sum eru flutt úr Klaksvík higartil í ár, eru serliga útlendingar og ein stórt tal av ungfólkum, sum fara av landinum at lesa, sigur Steinbjørn Jacobsen.

– Her er ikki talan um familjur, sum rýma úr býnum, men meira um fólk, sum fara burtur í lestrarørindum, og ein stórur partur av teimum kemur vónandi aftur til Klaksvíkar, sigur hann.

### Minkingin

31. juli í ár var fólkatalið í Klaksvík 4.754, og tað var 26 fólk færri, enn tá árið byrjaði.

Í hesum tíðarskeiðinum eru 77 fólk flutt úr Klaksvík til útlandið, meðan góð 40 eru flutt til aðra kommunu í Føroyum.

Sama tíðarskeið eru 58 fólk flutt til Klaksvíkar úr útlandinum og 30 úr øðrum kommunum í landinum. Hetta hevur tó samanlagt við sær, at fólkatalið í Klaksvík er minkað við 26 fólkum.

– Eg stúri ikki so nógv fyri hesum tølunum, tí hetta er vanlig flyting. Ungfólk skulu hava útbúgving, og útlendingar hava ikki fingið sær fastan bústað í Klaksvík. Vit skulu bara syrgja fyri at hava umstøður, so fólk koma aftur til Klaksvíkar at búgva, tá tey hava fingið útbúgving, sigur Steinbjørn Jacobsen.

– Vit hava framvegis burðaravlop, og talið á umsóknum um grundstykki og ansingarpláss veksur, so hetta er ein livandi býur.

### Ikki sama støði enn

Fólkatalið í Klaksvík var í áttatiárunum omanfyri 5000 fólk, men tað fann sær ongantíð fasta legu har.

Við árslok í 1989 búðu 4.9991 fólk í Klaksvík, men næstu árini fór fólkatalið at minka, soleiðis sum tað gjørdi í øllum landinum.

Í 1995 var fólkatalið í Klaksvík komið niður á 4.500 fólk, og tað er ongantíð komið upp aftur á tað, sum tað var áðrenn kreppuárini.

Við ársbyrjan í ár búðu 4.780 fólk í Klaksvík, og hósat fólkatalið í Klaksvík frá 1995 til 2001 er vaksið við 5,6 prosentum, so er talan um ein afturgongd upp á 240 fólk síðani 1989.

## Skúlaheimið hevur rundan dag

Í dag eru tað liðin 25 ár, síðan skúlaheimið við Marknagilsvegin varð tikið í nýtslu

Skúlaheimið er ein partur av virkseminum hjá Tekniska skúla í Havn.

Nýggju hølini við Marnagilsvegin vórðu tikin í nýtslu 30. august í 1976, og Helgi og Frida Øster, sum høvdu havt leiðsluna av skúlaheiminum í Kongagøtu, hildu fram sum leiðarar á nýggja skúlaheiminum.

Tey høvdu leiðsluna, til núverandi leiðarin, Rannvá Hansen, varð sett í starv.

Tað eru fleiri 1000 ungir føroyingar, sum í styttri ella longri tíðarskeið hava havt sítt tilhald á Skúlaheiminum við Marknagilsvegin.

Pláss er fyri umleið 90 næmingum á heiminum.

**ek**